# Reyði Krossur Føroya

# Ársfrágreiðing 2015

## Inngangur

"Tá menniskjan lærir at temja náttúrumegirnar... Tá vindarnir gerast kyrrir, og jørðin ikki kann sundurslítast... Tá onki einsemi er... ongin armóð... onki kríggj... tá síðsti maður, kvinna ella barn hevur fingið at eta... Bert tá verður ikki tørvur á Reyða Krossi."

Soleiðis hevur Albert Schweitzer, vinnari av Nobel friðarheiðursløninni, sagt, um hví neyðugt er við Reyða Krossi.

Reyði Krossur Føroya er partur av heimsins størsta humanitera felagsskapi við 13 milliónum sjálvbodnum. Og tørvur er á Reyða Krossi! Í Føroyum og úti í heimi.

Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu, tryggja virðingina fyri menniskjanum, umframt at verja sínámillum semju, vinalag, samstarv og varandi frið millum øll fólkasløg.

Okkara sjey aðalreglur eru: at vera menniskjanslig, at vera ópartísk, at vera uttanveltað, at vera óheft, at vera sjálvboðin, at vera ein eind og at vera algildug.

Reyði Krossur Føroya er eitt sjálvstøðugt felag undir Reyða Krossi í Danmark. Reyði Krossur Føroya varð stovnaður 2. apríl 1926 og fyllir 90 ár í 2016.

189 av heimsins londum hava eitt tjóðskaparligt Reyða Kross- ella Reyða Hálvmánafelag. Hetta eru øll londini, ið hava undirskrivað Genevesáttmálarnar. Feløgini arbeiða tjóðskaparliga og um møguligt eisini altjóða. Reyði Krossur og Reyði Hálvmáni eru tvey heiti fyri sama felagsskap.

Altjóða Reyða Kross Komitéin, ICRC (International Committee of the Red Cross), arbeiðir í kreppu-, stríðs- og krígsstøðum. Genevesáttmálarnir geva Altjóða Reyða Kross Komitéini, ICRC, heimild til av sjálvseintingum at arbeiða í krígsførandi londum.

ICRC varð stovnað í 1863 og hevur høvuðssæti í Geneve.

Altjóða føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum, IFRC (International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies), er paraplyfelagsskapurin fyri tey 189 tjóðskaparligu feløgini. Føderatiónin (IFRC) arbeiðir saman við Altjóða Reyða Kross Komitéini, ICRC, og tjóðskaparligu Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgini í sambandi við vanlukkur og menningarhjálp. IFRC føderatiónin varð stovnað í 1919.

Føderatiónin, IFRC, er saman við tjóðskaparligu feløgunum og Altjóða Reyða Kross Komitéini, ICRC, tað, ið nevnist Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Rørslan. Øll eru tvinnað saman við teimum sjey aðalreglunum, ið vóru viðtiknar í 1965.

## Samstarvsavtala millum DRK og RKF

Í 2015 er nýggj samstarvsavtala gjørd millum Reyða Kross í Danmark og Reyða Kross í Føroyum, ið avloysir avtaluna frá 1997.

Endamálið við samstarvsavtaluni er at fremja menningina at styrkja Reyða Kross arbeiðið í Føroyum. Hetta bæði fyri at kunna møta tørvinum í føroyska samfelagnum fyri sjálvbodnum humaniterum virki og fyri at fremja møguleikarnar hjá føroyska samfelagnum at veita stuðul til altjóða humanitera arbeiðið hjá Reyða Krossi.

## Samstarvsfundir við Reyða Kross í Danmark

Tvey umboð fyri nevndina í Reyða Kross Føroya vóru, eins og umboð fyri Reyða Kross í Grønlandi, á árliga formansráðleggingarfundinum hjá Reyða Krossi í Danmark í 2015.

Umframt hetta vóru tey til fleiri fundir á landskontórinum í Keypmannahavn til íblástur, kunning og samráðing. Her hittu tey starvsfólk frá nógvum ymiskum virksemisøkjum í Danska Reyða Krossi, ið hava ábyrgd av at stuðla undir sjálvbodna virkseminum. Eisini høvdu føroysku umboðini framløgu fyri starvsfólkunum á landskontórinum um Reyða Kross arbeiðið í Føroyum.

## Samstarv við smáu europeisku tjóðskaparligu Reyða Kross feløgini

Reyði Krossur Føroya og Reyði Krossur í Grønlandi vóru við tveimum umboðum hvør í Reykjavík í juni til íblástrar- og samstarvsfundir við smáu europeisku tjóðskaparligu Reyða Kross feløgunum. Hetta nevnast SENS-fundir (SENS stendur fyri Small European National Societies).

Tað er fyrstu ferð, at Reyðu Krossarnir í Grønlandi og í Føroyum vóru bodnir við. Hini smáu Reyða Kross feløgini í SENS-bólkinum eru Ísland, Andorra, Kypern, Liechtenstein, Luxembourgh, Monaco og Montenegro, ið øll eru sjálvstøðug tjóðskaparlig Reyða Kross feløg.

Øll feløgini høvdu framløgu um teirra Reyða Kross arbeiði og um tær avbjóðingar, tey hava í teirra virksemi og landi.

Elhadj As Sy, aðalskrivarin fyri Altjóða Føderatónina av Reyða Kross og Reyða Hálvmána Feløgum (IFRC), luttók eisini á fundinum saman við einum eygleiðara frá IFRC. Gávan frá Reyða Krossi Føroya til aðalskrivaran As Sy vóru einar heimabundnar hosur við reyðum krossi á frá okkara Reyða Kross Klædnahjálp. Aðalskrivarin bleiv sera glaður fyri gávuna.

Feløgini vóru ógvuliga áhugað í at hoyra um okkara landsinnsavning, og hvussu vit skipa hesa hurð til hurð innsavning. Tey fingu øll hvør sítt faktakort, sum Reyða Kross bússuberararnir lata í øllum húskum í Føroyum. Hetta hildu tey vera sera inspirerandi, og fleiri teirra søgdu seg umhugsa at gera eina landsinnsavning í teirra heimlandi fyri at rótfesta Reyða Kross í fólkinum.

Lagt er út í kortið at halda áfram við hesum samstarvinum og at royna at geva hvør øðrum íblástur til at fáa ung í okkara londum at gerast virkin í Reyða Kross arbeiði.

## United World College Red Cross Nordic

United World College Red Cross Nordic bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið á sumri er liðugur í 1. flokki í eini gymnasialari miðnámsútbúgving, at taka eitt altjóða studentsprógv, kallað IB (International Baccalaureate) á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi.
Reyði Krossur Føroya hevur eitt umboð í nevndini, sum velur út, hvør næmingur úr Føroyum sleppur á United World College í Noregi.

IB (International Baccalaureate) er ein altjóða studentsprógvtøka, ið tekur 2 ár. Eitt IB prógv gevur somu rættindi innan hægri framhaldslestur sum eitt føroyskt studentsprógv.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og hetta verður m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 80 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

## Endurnýtsluvirksemi í Reyða Krossi

Reyði Krossur Føroya hevur eitt umfatandi endurnýtsluvirksemi og samanlagt eru eini 85 sjálvboðin virkin í hesum virksemi. Klædnainnsavningin savnar inn eina stóra mongd av klæðum í bingjum kring landið, meðan Klædnaskiljingin hjá Reyða Krossi í Stiðjagøtu í Havn skilir hópin av klæðum. Eisini verður í Reyða Krossi tikið ímóti og skilt væl av bókum og nakað av lutum. Vit hava tríggjar endurnýtsluhandlar. Eina bókasølu í Vágsbotni í Havn, ein klædna- og lutahandlil á Bryggjubakka í Havn og ein klædna- og lutahandil í Vági. Umframt at vit hava loppumarknaðarvirksemi og filatelivirksemi.

## Klædnainnsavningin og flutningstænastan

Klædnainnsavningin og flutningstænastan hava níggju bingjur standandi kring landið. Fýra eru uttanfyri hjá Reyða Krossi í Stiðjagøtu í Havn. Hinar eru við FK handlar kring landið - í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági og Skopun. Bingjurnar verða tømdar hvønn mikudag.

Innsavnaðu klæðini verða avskipað til skiljingar í Reyða Krossi í Stiðjagøtu. Skopun hevur eina serstaka skipan, og klæðini hagani verða koyrd  til Havnar við jøvnum millumbilum.

Umframt innsavning av endurnýtsluklæðum hava Klædnainnsavningin og flutningstænastan

ábyrgdina av, at innsavnaðu klæðini verða send av landinum. Í 2015 eru 24 bingjur á 7,5 tons við klæðum sendar til DRK. Samanlagt sendi RKF 195 tons av klæðum til DRK í 2015. Í fjør, 2014, vórðu 15 av hesum bingjunum fyltar við klæðum til DRK. Bert tríggjar av teimum blivu sendar til DRK í 2014, meðan tólv av bingjunum vóru sendar í februar í 2015, og tí telja tær saman við tølunum fyri í ár.

Onnur ábyrgdarøki í Klædnainnsavningini og flutningstænastuni eru millum annað flutningur millum hølini í Stiðjagøtu og Bryggjubakka, ruskkoyring, viðlíkahald av bilinum, viðlíkahald av bingjunum kring landið og ymiskar aðrar uppgávur.

10 sjálvboðin eru virkin í Klædnainnsavningini og flutningstænastuni, ið er skipað við einum leiðara.

## Klædnaskiljingin

Klædnaskiljingin er ein stórur partur av endurnýtsluvirkseminum hjá Reyða Krossi. Eini 22 sjálvboðin eru knýtt at hesum virkseminum.

Hvørt mikukvøld verða innkomin klæðir skild í Reyða Krossi í Stiðjagøtu í Havn. Klæðini verða skild soleiðis, at nakað fer í endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka, nakað til Reyða Kross Klædnahjálpina at hjálpa fíggjarliga sperdum fólkum, meðan tað mesta fer til Reyða Kross í Danmark.

Eftir at klædnainnsavningarbingjurnar vórðu settar upp í august 2012 er torført at fáa skilt alt, tí so nógv klæðir koma inn hvørja viku. Stórur partur av klæðunum fer tí óskildur til DRK. Klædnaskiljingin metir, at áleið helmingurin av innkomnu klæðunum verða skild. Mett verður eisini, at innkomin klæðir svarandi til áleið fimta hvønn posa og meira, eru í so ringum standi, at tey ikki kunnu fara til klædnasølu. Og í nøkrum av posunum eru klæðini fuktig.

Klædnaskiljingin er skipað við einum yvirskipaðum virksemisleiðara og einum leiðara fyri hvønn mikukvøldsbólk.

## Reyða Kross Bókasølan

Aftur í ár gekk sera væl við Bókasøluni. Sølan í 2015 var 160.133 krónur. Úrslitið táttar væl í søluna í 2014, ið var metár. Hetta árið var sølan áleið 163.000 krónur.

Vælvitjaða Reyða Kross Bókasølan í Vágsbotni í Havn er eitt slag av sjálvtøku, har fólk keypa bøkur og gjalda uttan nakað eftirlit. Bókasølan er opin sjey dagar um vikuna.

Ellivu sjálvboðin eru knýtt at Bókasøluni. Fýra mans hava dagliga eyguni við Bókasøluni, ið hevur opið allar sjey dagar í vikuni. Teir eru framvið og hyggja, um nakað nýtt er komið, og tá neyðugt er, leggja teir nýggjar bøkur fram. Afturat teimum fýra, ið varða av Bókasøluni, eru eisini átta fólk, ið eftir fastari skipan lata upp og læsa morgnar og kvøld.

Hvørt mikukvøld millum kl. 19.00 og 21.00 hittast teir og hava opið. Tá hava fólk høvi at koma við bókum og øðrum. Hetta eina kvøldið í vikuni koma ofta aðrir menn inn á gólvið og fáa ein kaffimunn og eitt prát. Hetta eru serliga menn, ið eru knýttir at Bókasøluni, ella menn, ið fyrr hava verið virknir í Reyða Krossi. So til ber at siga, at hetta mikukvøldið eisini er eitt sosialt mannfólkakvøld í Reyða Krossi.

Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis, og útreiðslurnar eru nærum ongar, tí munar Bókasølan ógvuliga væl hjá virkseminum í Reyða Krossi.

Bókasølan bleiv í 2015 skapað um til gamla sniðið, við at køksborðið við vaski varð tikið niður og sett upp inni í kjallaranum. Bókasølan er skipað við einum leiðara.

## Reyða Kross Endurnýtsluhandilin í Havn

Á Bryggjubakka í Havn hevur 2015 verið merkt av umfatandi byggiarbeiðinum uttanfyri. Hetta hevur í fleiri mánaðir gjørt tað sera óhøgligt hjá viðskiftafólki at koma á gátt í endurnýtsluhandlinum, og tað hevur sæst aftur í minkandi inntøku í ár í mun til í fjør.

Inntøkan í endurnýtsluhandlinum í Havn var 180.422 krónur í 2015. Tá eru tiknar við 10.000 krónur í kompensatión frá Poul Hansen fyri okkara mistu inntøku av teirra byggiarbeiði á økinum. Í 2014 var inntøkan beint yvir 190.000 kr. Vit vóna, at fleiri fólk koma í handlarnar á Bryggjubakka og í Vágsbotni, tá nýggja trappan hjá Tórshavnar kommunu verður liðug, og nýggj matstova í grannahúsinum letur upp í 2016.

Gjøgnum árið hava, eins og undanfarnu ár, verið evnisvikur í handlinum, har ávís klædnasløg hava fingið gott og sjónligt pláss. Hetta vísir seg í flestu førum at rigga væl og er við til økja um søluna.

Lutir fingu meir pláss, tá endurnýtsluhandilin fyri nøkrum árum síðani bleiv størri, og handilshølið er innrættað soleiðis, at framsýningin av lutunum sæst væl uttanífrá.

Aftur í ár varpaðu vit í samstarvi við Føroya Fólkaháskúla ljós á endurnýtslu. Í eina viku í november seldu vit endurnýtsluklæðir, ið næmingar á háskúlanum valdu úr okkara klædna-skiljing.

Endurnýtsluhandilin hevur heimasíðu á Facebook. Her siga vit frá um evnisvikur, leggja myndir út, tá nýggj vøra kemur í handilin, eins og aðrar viðkomandi lýsingar verða lagdar út her.

Vit hava 1675 limir í facebookbólkinum, so hetta er ein góður sýnisgluggi hjá okkum.

Endurnýtsluhandilin í Havn er opin fýra dagar um vikuna. Týsdag til fríggjadag frá kl. 13.30 til 17.30. Vanliga eru tvey fólk í handlinum í senn. Einar 30 sjálvbodnar kvinnur varða av handlinum.

Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006. Handilin er skipaður við einum leiðara og tveimum varaleiðarum, og annars er ein, sum varðar av hvørjum vikudegi sær.

## Reyða Kross Endurnýtsluhandilin í Vági

Endurnýtsluhandilin í Vági heldur til í einum góðum handilshøli miðskeiðis í bygdini. Í løtuni eru einar 14 sjálvbodnar kvinnur, sum virka í sambandi við endurnýtsluhandilin í Vági.
Handilin er opin fýra dagar um vikuna. Mánadag kl. 14.00 til 17.30, mikudag kl. 14.00 til 17.30, fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00.

Mánadag og mikudag eru tríggjar til fýra sjálvbodnar kvinnur í handlinum. Fríggjadag og leygardag eru ein til tvær sjálvbodnar í handlinum. Hetta liggur í føstum skema.

Tær sjálvbodnu kvinnurnar skilja og strúka eisini klæðir teir dagarnar, handilin er opin. Eisini skipa tær fyri, at kaffi, te og annað verður sponsorerað av privatum fólki og handlum har um leiðir.

Reyða Kross Endurnýtsluhandilin í Suðuroy læt dyrnar upp á sumri í 2011.

Í 2015 seldi endurnýtsluhandilin í Vági fyri 32.589 kr. Hetta eru áleið 8.000 krónur meira enn í fjør.

Handilin er skipaður við einum leiðara.

## Loppumarknaður

Aftur í ár høvdu vit, eins og í fjør, tveir loppumarknaðir. Hin fyrri var ein várloppumarknaður, ið var hildin leygardagin 2. mai. Hin seinni var eina jólaloppumarknaður, ið var hildin leygardagin 28. november.

Báðir loppumarknaðirnir vóru í Stiðjagøtu í Havn og góvu tilsamans 40.810 krónur í inntøku til virksemið hjá Reyða Krossi.

Seinnu árini eru fólk byrjað at selja hópin av loppulutum á facebook og á netinum. Eisini eru nógvir loppumarknaðir bæði í Havn og kring landið. Hetta merkir, at Reyði Krossur fær ikki so nógv inn meira av góðum loppuvørum, so hetta virksemið hjá okkum er minkað.

Loppumarknaðirnir vóru skipaðir við tveimum leiðarum.

## Filateli

Reyði Krossur savnar enn frímerkir, myntir og pengaseðlar. Tað, sum kemur inn, verður skilt og selt á uppboðssølu í Føroyum ella uttanlands, og peningurin fer til virksemið hjá Reyða Krossi Føroya.

Eins og í fjør hevur ikki verið nógv at gjørt hesum viðvíkjandi gjøgnum árið. Tilfarið minkar í heilum, og tað verður verri at fáa til vega frímerkir í framtíðini, nú so nógv samskifti er umvegis teldubrøv. Nakað tilfar er sent víðari til sølu, hóast tað ikki er selt enn.

Á sumri í 2014 fingu vit ein peningakistil við Reyða Kross búmerkinum á, ið stendur í tax-free handlinum á flogvøllinum. Skipasmiðjan MEST og Atlanticpane í Kollafirði hava gjørt kistilin ókeypis sum stuðul til okkara innsavningararbeiði. Kistilin er enn ikki tømdur, men nakað av peningi er komin í. Næsta ár fær Reyði Krossur ein kistil afturat at seta upp. Enn er óvist, hvar hann fer at standa. Í 2015 var samlaða filateliinntøkan 5.450 krónur.

## Landsinnsavningin 12. september

Kring alt landið gingu sjálvboðin við bússu frá hurð til hurð leygardagin 12. september at savna inn fyri Reyða Kross. Fólk stuðlaðu innsavningini væl og lótu pening í bússurnar. Landsinnsavningin setti aftur met í 2015. Inn komu 1.373.977,55 krónur. Hetta eru nær við 600.000 krónur meira enn í fjør, ið eisini var eitt metár fyri landsinnsavningina í mun til at savna inn frá privatfólki.

Í 2014 savnaðu vit inn beint yvir 822.000 krónur. Hóast hetta vóru 11.000 krónur minni enn í 2013, savnaðu vit meira inn frá privatfólki. Í 2013 lótu nakrar føroyskar fyritøkur okkum pening til landsinnsavningina, ið ikki lótu aftur í 2014 og heldur ikki í ár.

Føroyska vinnulívið lat 92.000 krónur til landsinnsavningina í 2015. Restin av stuðlinum kom frá privatfólki í Føroyum. Bússurnar einsamallar góvu 1.024.433 krónur.

At vit fingu savnað inn so nógvan pening í 2015 hongur bæði saman við, at vit øktu okkara arbeiði við at savna inn og varpa ljós á landsinnsavningina, umframt nógvu umrøðuna í fjølmiðlunum av syrgiligu og ógvusligu flóttarfólkastøðuni serstakliga av krígnum í Sýria. Myndirnar av menniskjum, ið flýggja undan krígnum og vónloysinum, settu seg í hjørtini.

Arbeiðið at fyriskipa landsinnsavningina fór longu í gongd tíðliga í vár. Í bólkinum, ið fyriskipaði landsinnsavningina í ár, eru sjey fólk. Dúgliga hevur verið arbeitt við at skipa og samskipa innsavningina, menna mannagongdir, arbeiðsskjøl, gera tilfar til at lýsa innsavningina og varpa ljós á hana.

Úti um landið hava vit nógv trúgv ábyrgdarfólk, sum taka ímóti bússum til eitt heilt øki, og síðani sjálv skipa fyri at fáa fólk at ganga við bússum. Hesi gera eitt stórt arbeiði. Eisini skipaðu vit í ár fyri at hava ábyrgdarfólk í Havn, ið tóku á seg at hjálpa við at fáa fólk at ganga í høvuðsstaðarøkinum.

Áleið fýrahundrað fólk savnaðu inn fyri Reyða Kross. Og fleiri túsund føroyingar lótu dyrnar upp fyri okkum og stuðlaðu. Fólk lótu pening í bússurnar, gjørdu flytingar umvegis peninga-stovnarnar, umvegis heimasíðuna og gjøgnum innsavningar-telefonnummarið 905656. Eisini starvsfólk á nøkrum arbeiðsplássum skipaðu fyri at savna inn til landsinnsavningina.

Ofrini fyri ógvusligu vápnaðu bardagarnar í Sýria líða. Grannalondini, ið hava givið innivist og tryggleika til fleiri milliónir flóttafólk, eru um at hokna undan byrðuni, og tørvurin á humaniterari hjálp er átroðkandi. 700.000 krónur frá landsinnsavningini blivu sendar at hjálpa ofrunum fyri krígnum í Sýria. 600.000 krónur fóru til bráðfeingishjálp, meðan 100.000 krónur

eru sendar at veita psykososiala hjálp móti sálarligu traumunum, ið fleiri børn og vaksin líða undir av krígnum. 100.000 krónur av landsinnsavningini eru settar á kontu fyri seg til at hjálpa í Føroyum. Restin stendur til at hava tøkt.

## Samarittarnir

Aftur í ár hava samarittarnir verið sera virknir við 26 tiltøkum og samanlagt 2230 tímum á vakt. Hóast hetta eru fýra tiltøk færri enn í 2014, kunnu vit staðfesta, at virksemið hjá samarittunum framhaldandi er høgt.
Afturat hesum hava samarittarnir havt eina stóra venjing saman við øllum bjargingar-bátunum, fjallabjargarum og SAR tyrluni.

Tríggir samarittar vóru í 2015 við á stóra tónleikafestivalinum í Jelling í Danmark, har tey arbeiddu saman við donsku samarittunum. Føroysku samarittarnir hava nú í fleiri ár fingið sær góðar royndir við at arbeiða saman við donsku samarittunum á hesum stóra festivali.

Reyði Krossur hevur 20 virknar samarittar (við í hesum eru eisini toymisleiðarar og vaktleiðarar) og sjey virknar aspirantar. Eisini fingu tey ein nýggjan toymisleiðara í ár. Fýra av samarittunum hava verið óvirknir í 2015 vegna arbeiði og skúla uttanlands.

Samarittarnir høvdu 130.463 krónur í inntøku í 2015.

Reyða Kross samarittarnir eru skipaðir við einum virksemisleiðara.

## Fyrstahjálpin

Fyrstahjálpin hevði eitt sindur meira virksemi í 2015 enn í fjør. Eins og seinnu árini hava vit hildið fleiri grundskeið í fyrstuhjálp. Fyrstuhjálparinstruktørarnir hava undirvíst í vanligu fyrstuhjálparskeiðum, dagføringarskeiðum og í ferðslutengdari fyrstuhjálp.

Reyði Krossur hevur tilgongd av stovnum og virkjum, ið ynskja skeið frá okkum. Síðan AED (hjartastartarar) eru komnir ymsa staðni kring landið, hevur eftirspurningurin verið stórur eftir júst hesum skeiðinum.

Prísirnir hjá Reyða Krossi eru kappingarførir við hinar útveitararnar av fyrstuhjálparskeiðum. Kappingin er hørð á marknaðinum, og tað eru nógv, ið veita skeið í fyrstuhjálp. Undirvísing í fyrstuhjálp í dagtímunum er avmarkað vegna arbeiðið hjá instruktørunum, eins og tað er avmarkað, hvussu nógv skeið vit kunnu bjóða privatum arbeiðsplássum og almennum stovnum, ið ynskja skeiðini í dagtímunum.

Í 2015 hevði fyrstahjálpin 64.770 krónur í inntøku. Hetta er eitt sindur meira enn í fjør, tá fyrstahjálpin hevði beint undir 50.000 krónur í inntøku.

Tveir instruktørar fóru úr Reyða Kross Fyrstuhjálpini í heyst. Ein fór á pensjón og hin fór í privatu vinnuna. Við árslok hevði Reyði Krossur Føroya tríggjar instruktørar. Ætlanin er, at tveir nýggir instruktørar verða útbúnir í 2016.

## Ársins Fyrstahjálpari 2015

Fýra fólk fingu heiðurin "Ársins Fyrstahjálpari 2015" frá Reyða Krossi Føroya.

Hesi fýra eru Joan Hovgaard, Laila Jacobsen, Eyðstein Poulsen og Tummas Jóhansson Lervig, ið framdu eitt framúr avrik í fyrstuhjálp í 2015.

Saman fingu tey heiðurin at verða kosin Ársins Fyrstahjálparar 2015, tí tey skjótt og væl veittu og skipaðu fyri lívbjargandi kropsligari fyrstuhjálp til Karl Mouritsen, ið bert 14 ára gamal brádliga fekk hjartasteðg undir einum fótbóltsdysti í Klaksvík 15. august í 2015. Eisini fingu tey heiðurin fyri at hava veitt og skipað fyri sálarligari fyrstuhjálp til leikarar og onnur bæði úr KÍ og 07 Vestur.

Sambært foreldrunum hjá Karl segði hjartalæknin á Ríkissjúkrahúsinum um fyrstuhjálpina, ið Karl beinanvegin fekk á staðnum, at “onkur eigur at fáa gullmedalju”.

Fyri teirra framúr avrik í fyrstuhjálp, bæði kropsligu og sálarligu, og góða samstarv fingu Joan Hovgaard, Laila Jacobsen, Eyðstein Poulsen og Tummas Jóhansson Lervig heiðursbræv frá Reyða Krossi og ein kekk frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Átjan fólk blivu tilnevnd til at verða kosin Ársins Fyrstahjálpari 2015.

Hesi hava øll gjørt sera góða avrik innan fyrstuhjálp. Tey tilnevndu fingu øll eitt heiðursblað frá Reyða Krossi og ein gávuposa frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Endamálið hjá Reyða Krossi við at tilnevna Ársins Fyrstahjálpara er tvýbýtt. Tað eina er at heiðra tey okkara millum, ið hava útint holla og lívbjargandi fyrstuhjálp, hitt endamálið er at varpa ljós á, hvussu umráðandi tað er at duga fyrstuhjálp.

Hetta er fjúrtanda ferðin, at Ársins Fyrstahjálpari verður kosin av Reyða Krossi.

## Vitjanartænastan

Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi í Havn er sera virkin. Í 2015 høvdu vit 956 vitjanartímar. 30 sjálvboðin vitja fast, onkur er í bíðistøðu. Fjúrtan vitjanarvinir vitja fólk í privatum heimum, meðan sekstan vitja á ellisheimum.

Á Boðanesheiminum hava tey eitt undirhús, sum ein av okkara vitjanarvinum er við í ein tíma um vikuna. Vitjanarvinurin hevur ymiskar dagdvøljur við og heldur mannfólkaprátinum í gongd. Umframt hetta vitja fýra onnur á Boðanesheiminum. Á heiminum í Vallalíð vitjar ein vitjanarvinur, á Tjarnagarði vitja fýra, og á Lágargarði vitja seks.

Leiðararnir av Reyða Kross Vitjanartænastuni luttóku í februar á ráðstevnu við Alzheimer-felagnum og kommunufelagnum og greiddu frá, hvussu Vitjanartænastan byrjaði, og hvussu hon arbeiðir nú.

Leiðararnir vóru eisini í eldrafelagnum Nón í Runavík og greiddu frá Vitjanartænastuni, eins og tær vóru bodnar á fund á Boðanesheiminum, tá kommununar yvirtóku eldraøki.

Landssjúkrahúsið setti seg í 2015 í samband við Reyða Kross Vitjanartænastuna um skipan av sjúklingastuðlum, sum tey brúka í Slagelse í Danmark, har hetta er í samstarvi við Reyða Kross og sjúkrahúsið.

Leiðararnir í Vitjanartænastuni vóru á skeiði hjá Reyða Krossi í Danmark í 2015.

Hugnakvøld var fyri vitjanarvinum í mai við einum fakligum innleggi um diabetis eins og hugnaligur jólahugni eisini var.
Í summar hevði Reyði Krossur vitjan av einum donskum journalisti, ið skal varpa ljós á sjálvboðið arbeiði í Norðurlondum í Le Monde Diplomatique. Journalisturin var við einum vitjanarvini á vitjan hjá einum eldri manni, og samrøða var eisini gjørd við leiðararnar av Vitjanartænastuni. Greinin kemur í avísina í 2016. Kringvarpið varpaði ljós á tænastuna við at hava samrøðu við Reyða Kross Vitjanartænastuna í Góðan Morgun Føroyar í mai mánað. Eisini blaðið Kvinna ynskti at varpa ljós á einsemi í Føroyum og hevði samrøðu við leiðararnar av Vitjanartænastuni. Hendan greinin kemur í blaðið í januar 2016.

Fleiri lesandi frá Fróðskaparsetrinum og Handilsskúlanum hava sett seg í samband við Vitjanartænastuna um interview um virksemið, og hetta hava leiðararnar eisini tikið sær av.

## Klædnahjálpin

Klædnahjálpin veitir góð barnaklæðir frá klædnaskiljing okkara til familjur í Føroyum, ið eru fíggjarliga illa fyri og hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Hetta eru barnafamiljur, ið ofta eru raktar av sjúku og/ella av ymiskum sosialum trupulleikum. Eisini fær klædnahjálpin nógv hágóðsku klæðir, ið verða latin Klædnahjálpini beinleiðis og eyðmerkt henni at lata í Føroyum.

Reyða Kross Klædnahjálpin hevði fýra vælvitjað tiltøk í 2015, har nógvar barnafamiljur komu at fáa sær hjálp frá okkum. Tvey tiltøk vóru í mars, eitt í september og eitt í november. Tiltøkini

blivu hildin í hølunum hjá Reyða Krossi í Stiðjagøtu. Til jólatiltakið, ið var næstsíðsta leygardagin í november, fingu børnini eisini eina lítla gávu hvør, og hetta skapti gleði.

Hvørja ferð Reyða Kross Klædnahjálpin skal hava tiltak, fáa allir felagsskapir og stovnar í Føroyum, ið hava við barnafamiljur at gera, kunning frá okkum í góðari tíð og avtalað er, at tey lýsa tiltøkini á teirra heimasíðum og facebooksíðum.

Reyða Kross Klædnahjálpin samstarvar við Herbergið, soleiðis at teirra brúkarar fáa góð klæðir og seingjarklæðir frá okkum, eins og vit hjálpa Kvinnuhúsinum við bráðfeingis klædnahjálp, tá tørvur er á hesum.

Reyða Kross Klædnahjálpin bleiv sett á stovn tíðliga á vári 2013. Eini sjey sjálvboðin eru virkin í bólkinum. Reyða Kross Klædnahjálpin er skipað við einum leiðara og tveimum varaleiðarum.

Eisini Reyða Kross Klædnahjálpin bleiv interviewað til greinina í Le Monde Diplomatique um sjálvboðið arbeiði í Norðurlondum eins og journalisturin var við eina leiðaranum fyri Klædnahjálpina á Herberginum. Greinin kemur í avísina í januar 2016. Kringvarpið varpaði ljós á tiltøkini hjá Klædnahjálpini í eini SURK-sending ein leygardag.

Tiltøkini hjá Klædnahjálpini verða lýst bæði á okkara egnu heimasíðu, á fleiri øðrum viðkomandi heimasíðum og facebookbólkum, har vit miðvíst miðla hetta til tey, ið hava klædnahjálpina fyri neyðini. Nøkur teirra eru soleiðis fyri, at tey av og á fáa klæðir beinleiðis frá Reyða Kross Klædnahjálpini, tí tey eru ov illa fyri til at koma til tiltøkini.

## Bókagáva til barnadeildina á Landssjúkrahúsinum

Aftur hesi jólini hevur Reyði Krossur latið barnadeildini á Landssjúkrahúsinum góðar barnabøkur. Bøkurnar, ið eru frá endurnýtslubókasøluni hjá Reyða Krossi, eru í sera góðum standi – sum nýggjar.

Á Barnadeildini eru tey fegin um góðu bøkurnar til børnini. Teimum tørvar gávuna, tí tað er sjáldan, at lesnaður verður keyptur til deildina.

### Integratiónsarbeiði

Seinnu árini eru altsamt fleiri tilflytarar komnir til Føroyar, og fleiri teirra koma úr londum uttanfyri ES. Reyða Krossur Føroya ynskir at hjálpa við at fremja integratiónina fyri hesi nýggju í Føroyum. Tí hevur Reyði Krossur í 2015 arbeitt við at fyriskipa, hvussu vit seta í gongd integratiónsarbeiði í Føroyum, og fundir hava verið við avvarðandi myndugleikar.

Í heyst byrjaði eitt fyrireikandi arbeiði saman við stigtakarunum av tiltakinum “Hvussu kunnu vit hjálpa”, ið var í Norðurlandahúsinum 12. september – sama dag sum Reyði Krossur hevði landsinnsavning. Avgjørt varð at arbeiða saman um at fremja integratiónina í Føroyum og at byrja integratiónsátøk í byrjanini av 2016.

### URK – Ung í Reyða Krossi

Í 2015 hevur aftur verið roynt at fáa ung at gerast virkin í Reyða Krossi. Móti endanum av árinum eydnaðist at fáa ein lítlan bólk við fimm ungum fólkum, ið fóru í gongd við at fyrireika eitt virksemi. Í 2016 er ætlanin, at hesi ungu fara í gongd við ymiskt kunningararbeiði, eitt nú at halda fyrilestrar fyri skúlanæmingum um, hví vit hava Reyða Kross, og hvat Reyði Krossur ger.

### Neyðhjálp, bráðfeingishjálp og menningarhjálp

Samlaða upphæddin, ið Reyði Krossur Føroya læt til hjálp uttanlands í 2015, var 830.000 krónur. Umframt hetta læt Føroya Landsstýri 200.000 krónur til bráðfeingishjálp ígjøgnum Reyða Kross.

### Bráðfeingis neyðhjálp til Sýria

Kríggið í Sýria hevur ført við sær eina álvarsliga og trupla humanitera støðu. Í 2015 sendi Reyði Krossur Føroya 610.000 krónur til bráðfeingis neyðhjálpararbeiðið í Sýria. Peningurin fer til yvirskipaða humanitera neyðhjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi og Sýrisk Arabiska Reyða Hálvmána.

Í 2015 metir ST, at eini 13,5 milliónir fólk í Sýria hava átrokandi tørv á humaniterari hjálp. Av hesum eru eini 6,5 milliónir fólk flýdd innanhýsis í Sýria, har tey liva undir ógvuliga vánaligum korum. Tað eru hesi fólkini, ið Reyði Krossur Føroya sendir hjálpina til.

Yvirskipaða neyðhjálpararbeiði hjá Sýrisk Arabiska Reyða Hálvmána og Reyða Krossi í Sýria er at geva fólki mat, heilivág, reinførislutir, teppir, innivist, køkslutir til at kunna matgera og atgongd til reint vatn og læknahjálp.

Áðrenn kríggið byrjaði, var Sýria eitt land við heilt fáum fátøkum fólkum. Men fýra ár við borgarakríggi hava oyðilagt stóran part av landinum, og tørvurin á humaniterari neyðhjálp er ómetaliga høgur. Hjálpin úr Føroyum er partur av einum hart tiltrongdum neyðhjálpararbeiði til vetrarmánaðirnar at hjálpa fólki at yvirliva veturin og fáa eitt meira virðiligt lív.

Áðrenn borgarakríggið byrjaði fyri skjótt fimm árum síðani, búðu eini 22 milliónir fólk í Sýria. Nú fleiri eru flýdd bæði innanhýsis í landinum, til grannalondini og serstakliga í 2015 eisini fleiri til Europa, búgva bert 16,5 milliónir fólk í landinum – og heili 13,5 milliónir fólk eru bundin av at fáa neyðhjálp.

Av teimum 610.000 krónunum, ið Reyði Krossur Føroya hevur sent til bráðfeingis humanitera hjálpararbeiðið í Sýria, koma 600.000 krónur frá landsinnsavningini í heyst, meðan 10.000 eru ein gáva frá eini føroyskari fyritøku, ið stuðlar hjálpararbeiðinum hjá Reyða Krossi í Sýria.

## Psykososialhjálp til børn og ung í Sýria

100.000 krónur frá landsinnsavningini blivu sendar til psykososiala hjálp fyri sýrisk børn, ið liva við ógvusligum upplivingum í gerandisdegnum og hava tørv á "normaliteti" og spæli, sum

millum annað verða boðin teimum í psykososialu deplunum hjá Sýrisk Arabiska Reyða Hálvmána.

SARC, Sýrisk Arabiski Reyði Hálvmáni, hevur fleiri miðdeplar í Damaskus, Aleppo og Qamishly umframt sjey mobil sentur kring Damaskus, Aleppo og Dae ez-Zour, ið hava psykososialt virksemi og hjálp. Psykososiala virksemi fevnir millum annað um psykologiska fyrstuhjálp, kunning um psykososialar spurningar, trupulleikar og loysnir, ymiskt sosialt virksemi og, tá til ber, serfrøðilig viðgerð.

## Bráðfeingishjálp til Nepal

Altjóða Reyði Krossur setti í verk eitt ógvuliga umfatandi vanlukkuarbeiði í Nepal eftir jarðskjálvtan 25. apríl, ið var máldur til 7,9 á Richter stiganum.

Reyði Krossur Føroya sendi 50.000 krónur til hjálpararbeiðið í Nepal. Peningurin varð nýttur til fyrstuhjálp og læknahjálp, til presendingar at veita fólki innivist, umframt til mat, vatn, teppir, heilivág og køksbúnyttir.

Altjóða Reyði Krossur, ella rættari Føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum (IFRC) setti í gongd sína tilbúgving og bað um hjálp frá nationalu feløgunum.

Feløgini kring heimin fóru til Nepal at inna bráðfeingishjálp í stóru náttúruvanlukkuni, ið kravdi fleiri túsund mannalív og løstaði fleiri túsund, eins og fleiri túsund blivu heimleys.
Reyði Krossur Føroya sendi 50.000 krónur til hjálpararbeiðið í Nepal. Peningurin varð nýttur til fyrstuhjálp og læknahjálp, til presendingar at veita fólki innivist, umframt til mat, vatn, teppir, heilivág og køksbúnyttir.

Undan járðskjálvtanum hevði Reyði Krossur útbúgvið 10.000 sjálvboðin í Nepal at inna fyrstuhjálp og leita eftir fólki í niðurrapaðum húsum í náttúruvanlukkum sum hesari. Hesi 10.000 sjálvbodnu Reyða Kross fólkini vóru beinanvegin á staðnum. Tey leitaðu eftir fólki, ið enn vóru á lívi í niðurrapaðu húsunum og góvu fyrstuhjálp til tey mongu løstaðu.

Reyði Krossur í Nepal hevur drúgvar royndir við vanlukkuhjálp og hevur ein høvuðsleiklut í tilbúgvingarætlanini hjá myndugleikunum í náttúruvanlukkum sum hesari. Altjóða Reyði Krossur sendi eitt sonevnt “felthospital” til Nepal, har møguleiki er at veita læknahjálp - eitt nú skurðviðgerðir.

## Bráðfeingishjálp til Wanuato

Føroya Landsstýri sendi 200.000 krónur umvegis Reyða Kross Føroya sum hjálp til ofrini fyri ógvusligu ódnina Pam, ið gjørdi stóran skaða í oyggjalandinum Vanuato í Kyrrahavinum í mars. Ódnin Pam rakti 13. mars 2015 Vanuato og fleiri av oyggjalondunum í “Oceania” í Kyrrahavinum.

Við vindmegi upp til 300 kilometrar um tíman er Pam hin næst ógvusligasta ódnin, ið nakrantíð er máld. Tann ógvusligasta var Haiyan, ið rakti Filipsoyggjarnar fyri fáum árum síðani og kravdi fleiri túsund mannalív.

Skaðarnir eftir ódnina Pam vóru ógvuliga umfatandi, og Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Føderatiónin, IFRC, sendu út appel um hjálp. Ódnin kravdi 11 mannalív, og fleiri enn 60.000 blivu eru rakt av ómetaliga stóru skaðunum.

Vanuato, ið hevur 260.000 íbúgvar á 65 oyggjum, bleiv fleiri staðir sett í undantøkustøðu. Fólk í túsundatali mistu hús og heim. Fyri fólkið í Vanuato er hendan ódnin tann størsta náttúruvanlukkan, ið nakrantíð hevur rakt landið.

Reyði Krossur skipaði fyri, at hjálpin frá Føroya Landsstýri fór til bráðfeingishjálp sum mat, reint vatn, teppir, heilivág og fyribils bústaðir.

## Barnalandið í Malawi

Reyði Krossur Føroya hevur einar 10 faddrar, ið hvønn mánað stuðla Barnalandinum í Malawi. Í 2015 komu 14.100 krónur komu inn frá faddrunum.

Reyði Krossur sendi 70.000 krónur til Barnalandið Malawi í 2015.

Stuðulin verður brúktur til at tryggja foreldraleysum børnum, ið liva í stórum fátækradømi, skúlagongd, mat og klæðir fyri við hesum at menna tey.